

## Kunning í samband við skúlafótbóltin 8. juni 2020 í Vági hjá 2. flokki

So fara vit í 2. flokki á skúlanum við Løgmannabreyt aftur til skúlafótbólt í Vági, tó vit stuttum skotbrái hesa ferð.

Um veðrið er til vildar, so verður kappingin vesturi á Eiðinum (úti), er ivaveður, so verður spælt í Marghøllini (inni).

Tað er sera umráðandi, at øll eru í heitum klæðum/hava heit **klæðir** við. Best er, um børnini ferðast í ítróttarklæðum. Børnini skulu eisini hava skiftiklæðir. Vit vilja mæla tykkum til at leggja skiftiklæðini í plastposar, so alt ikki verður vátt og skitið.

Mánadagin tann **8. juni 2020** fara vit saman við nøkrum foreldrum til Vágs til skúlafótbólt. Skúlin betalir fyri ferðakostnaðin hjá foreldrunum, tó ikki um tey hava egnan bil við.

Vit **møta** á Farstøðini í seinasta lagi **kl. 8.20**. Smyril siglir kl. 8.45. Tá vit koma á Drelnes standa bussar fyri okkum, sum koyra okkum til Vágs. Tað er eisini skipað fyri bussflutningi frá Vági til Drelnes.

Dagurin verður langur, tí er tað umráðandi, at øll hava etið ein góðan morgunmat, áðrenn fráferð. Harumframt skulu tey hava ein góðan og stóran **matpakka** við, umframt ein vatndunk. Vegna Korona tilmæli ber ikki til at keypa døgurða í ár, umframt ongin frukt verður at fáa. Tey eru vælkomin at hava lummapengar við, tó í mesta lagi kr. 100. Tey umsita sjálvi peningin.

Vit vita ikki, um vit fáa tíð at fara í Pálshøll at svimja hesa ferð. Men er tað onkur, sum hevur hug at svimja, so mugu tey eisini hava svimjiklæðir, handklæði og armringar, um tey ikki duga at svimja sjálvi, í einum plastposa, umframt kr. 20, tí tað er ikki ókeypis at svimja í ár.

Alt hjá barninum skal verða í einari tasku, sum tað sjálvt megnar at bera. Minnist til at seta navn á taskuna, so tað er lættari hjá okkum at halda skil á taskunum.

Eftir ferðaætlanini so er Smyrli væntandi **aftur í Havn** kl. 20.45.

Av tí vit koma so seint til Havnar, og næmingarnir hava havt ein langan dag, so kunnu næmingarnir møta **týsdagin 9. juni** millum 7.50 og 10.00.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 2. flokki

Ása, Rúni og Turid

GG! Minnist til at hava t-blusuna við navni í við.